# Jógvan Adolf farin

Jógvan Adolf Johannesen er farin um sýn. Hann gjørdist 70 ára gamal, ikki nakar høgur aldur, men sjúkan fekk yvirtakið á hesi kempu.

Jógvan var dalbingur. Vaks upp í einum fiskaraheimi, so hann visti um tey trongu kor fiskimaðurin og arbeiðarin høvdu.

Foreldur Jógvan´s vóru Frida og Sofus. Tveir brøður átti hann, Vittus sum býr í Dali, og Hans Marius sum býr í Tórshavn.

Henda dagin, sum Jógvan bleiv førdur við »Teistanum« um Skopunarfjørð fyri seinastu ferð, var tað sum Skopun hevði latið seg í tað vakrasta hon átti. Hon var klødd í hvítt úr hamri og í sjógv.

Mær tyktist, sum um Hamarin og Tunghamarin stóðu undir arm og teskaðu til Skopunar havn og søgdu: »Nú kemur hann fyri seinastu ferð. Hann, sum dagliga var á keiini, við spenningi um hvat bátar høvdu fingið, og tosaði við óvitarnar, sum stóðu og engdu. Hesir dreingir fingu altíð eitt herðaklapp frá hesum fryntliga manni. Nú var hann klárur at flyta til teir ævigu bústaðir.«

30 ár av sínum lívi kom Jógvan at virka her í bygdini. Hann gjørdist ein framstandandi maður.

Hann var skúlaleiðari, og røkti hann



tað til fulnar. Hann var skrivari hjá Skopunar Kommunu, har frá kendi eg hann best.

Jógvan hevði skip saman við bygdamonnum sínum, og hava teir ført mangan fongin til okkara oyggj.

Jógvan var valdur á ting fyri Javnaðarflokkin, og nýtist ikki mær at útdýpa ta tíðina, tí har bygdi hann sær varðar.

Tá Jógvan var pensioneraður, segði hann einaferð við meg, »eg haldi at eg fari at flyta aftur til Dals.« Væl sá eg, at tað var nakað serligt fyri hann. Hann flutti so, og seldi tey vøkru húsini í Skopun, og umbygdi barnaheimið í Dali til eitt sætt prýði.

Tað, sum lá Jógvan næst, var at fara at skriva. Hann var tað ein kallar ein mentaður maður, og hevði hann stóra vitan um søgu. Men so bleiv ikki, tí hann segði mær einaferð, at hann fekk ikki tikið penn í hondina.

Jógvan ringdi mangan til mín, nú eg var komin á ting, og spurdi hvussu gekk við Dalstunnilinum. Hann var spentur, at síggja úrslit. Nú er tann røddin tagna.

Eg sat við spenningi og bíðaði eftir, at útvarpið (Kringvarpið) fór at hava minningarorð um hesa serligu kempu, tí tað er jú vanligt.

Men útvarpið hevði ikki stundir til slíkt, sjálvt um tað var tosað við bæði høgan og lágan.

Æra veri minni um Jógvan Adolf Johannesen.

**Gerhard Lognberg**
**borgarstjóri og løgtingsmaður**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sigurd Bærentsen, Skopun** fer til gravar úr Skopunar kirkju mikudagin kl 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Sigurd, kunnu lata Skopunar kirkju eina gávu.

**Jens Johannus Joensen, Svínoy** í Landssjúkrahúskapellinum í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr salinum í Svínoy mikudagin klokkan 12. Í sambandi við jarðarferðina siglir Másin seinnapartin.

Kistan vð **Trúgva Egholm** fer av Eirargarði í dag kl. 17.00. Jarðarferðin verður úr Hvalvíkar kirkju hósdagin kl. 13.00. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Trúgva kunna lata eina peningagávu til bussin á bústovninum Eirargarður; konta í Føroya Banka

**Narvi Norðberg, Strendur**, andaðist mánadagin 22. januar, 48 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Nerija á Skála, hósdagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Narva, kunna lata eina peningagávu til Nerija; konta í peningastovninum

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Astrid Heinesen**
Haldórsvík

andaðist og varð jarðað

Takk til Ingu Poulsen Dam prest, fyri troystarrík orð í kirkjuni. Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar.
Takk til tykkum, ið bakaðu og hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur og kransar og takk fyri peningagávur til Røktarheimið á Mørkini.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ása, Johild og Dávur**

Listaframsýning:

# Petur Prent í Mentamálaráðnum

TÍÐINDASKRIV

Petur Mikkelsen (vanliga kallaður Petur Prent) letur upp listaframsýning í Mentamálaráðnum mikudagin 24. januar 2007, kl. 15.00 – 17.00. Framsýningin eitur "Úr siðbundna haftinum" og er hetta, sigur hann, hansara síðsta naturalistiska framsýning.

Petur Mikkelsen er føddur í Syðrugøtu í 1955 og hevur teknað síðan hann var smádrongur. Umframt framvegis at tekna, sker hann eisini linoliumsskurar og málar akvarel- og oljumálningar. Hansara stóri áhugi fyri litum hevði við sær, at hann valdi at fara í læru sum prentari, og var hann útlærdur í 1974. Hann sigur seg fáa íblástur við at eygleiða alt rundan um seg, - inni sum úti, árstíðirnar, illveður, sólskinsdagar,- og gráar dagar. Tá alt er sodnað og hevur ment seg í heilanum gongur leiðin inn í atelieri. Hann er ateliermálari og málar ikki uttandura longur.

Í altjóða listini eru tað



*Petur Prent letur upp eina listaframsýning í Mentamálaráðnum mikudagin 24. januar*

Leonardo, Rembrandt, van Gogh, Munch og Picasso, sum siga honum mest. Her heima eru tað m.a. Ingálvur av Reyni, Zacharias Heinesen, Amariel Norðoy, Eyðun av Reyni og Torbjørn Olsen.

Petur Mikkelsen fær somuleiðis íblástur frá omanfyri nevndu persónum, og roynir hann at finna sín egna persónliga stíl. Ætlanin er at fara á Kunstháskúla í Holbæk í næstum.

Framsýningin Framsýningin, ið er almenn, er opin til 16. apríl 2007. Øll eru vælkomin.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Føðingardagur**

Fríggjadagin 26. januar verður Virgar Frýdal, Tórshavn (ættaður av Velbastað), 90 ár.

**Prógv**

Mánadagin 22. januar 2007 fekk Havstein Klein, Saltangará, prógv sum master i teologi, cand theol frá lærda háskúlanum í Stavanger MHS.

**Dagurin**

**24. januar. Timoteus,** deyður umleið ár 68. Vinmaður og fylgisveinur hjá Paulusi ápostli, sum skrivaði honum tvey brøv. Eftir fornkirkjuligari frásøgu var hann eftir deyða Páls biskupur í Efesus, men toldi blóðvitnisdeyðan undir Nero keisara eins og ápostulin. Grikst navn ið merkir: tann sum óttast Guð.